## Venjarar leggja frá

Eftir stórtapið móti Argentina segði landsliðsvenjarin hjá Serbia & Montenegro, Ilija Petkovic, at hann legði frá sær. Nú hevur pólverski venjarin, Pawel Jenas, eisini boða frá, at hann gevst, tá HM-endaspælið er av.

Jenas hevur verið fyri hvøssum atfinningum undan HM-kappingini. Eitt nú, tí hann ikki tók Liverpool-málverjan, Jerzy Dudek, við í hópin. Undir HM-kappingini hava fleiri bløð eisini funnist at taktisku avgerðunum hjá venjaranum, og nú sigur Jenas, at hann tímir ikki meira.

## Milosevic fór um 100

Talan var ikki um nakað lukkuligt jubileum, tá Savo Milosevic spældi sín landsdyst nummar 100. Hesin var nevnliga móti Argentina, og saman við liðfeløgunum mátti liðskiparin hjá Serbia & Montenegro leggja rygg til eyðmýkjandi 6-0 tap. Milosevic hevur eisini boðað frá, at HM-endaspælið eisini markerar endan hjá sær á landsliðnum, og tí verður talan eftir øllum at døma um 101 landsdystir hjá manninum, sum føroysku málverjarnir munnu kenna so væl. Milosevic hevur í 100 landsdystum skotið 35 mál.

**-mørk**




*Við stórspælarum sum Wayne Rooney og Steven Gerrard á liðnum, eigur Ongland at vísa meira, enn liðið hevur gjørt til seinastu endaspølini, heldur Morten Olsen, danskur landsliðsvenjari*

# Ongland vísir ov lítið

**Danski landsliðsvenjarin í fótbólti heldur, at Ongland hevur víst alt ov lítið í seinastu endaspølunum. Morten Olsen heldur, at ein so stór fótbóltstjóð eigur gera meira vart við seg**

HM
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ongland telist millum mætastu fótbóltstjóðir í heiminum. Landið eigur kanska bestu fótbóltskappingina í heiminum, stjørnurnar flokkast á landsliðnum, og potentialið er sera stórt.

Men Ongland hevur trupult við veruliga at gera vart við seg til stóru EM- og HM-endaspølini, og higartil í ár, hevur enska liðið langt frá spælt sannførandi, hóast liðið hevur vunnið báðar dystirnar.

Danski landsliðvenjarin Morten Olsen heldur lítið um avrikini hjá Onglandi í seinastu endaspølunum.

– Tað er eitt vónbrot, at eitt so stórt land við so nógvum góðum spælarum ikki klárar at hava størri leikliga ávirkan á endaspølini. Ongland hevur einki víst í seinastu tveimum endaspølum, men vónandi verður tað øðrvisi í ár, sigur Morten Olsen, ið er fastur viðmerkjari hjá danska blaðnum BT undir HM-endaspælinum.

– Hóast tað eru liðin 40 ár, síðani Ongland vann HM, so er framvegis stór virðing um enskan fótbólt. Orsøkin er ivaleyst Premier League, men eisini bara navnið Ongland skapar virðing. Eg haldi tó ikki, at tað er nøkur orsøk at hava virðing fyri spælinum hjá teimum í seinastu endaspølunum.

### Venjarin hevur ábyrgdina

Morten Olsen veit alt um at standa við róðrið hjá einum fótbóltsliði, og hann er avgjørdur, tá ið hann skal finna persónin, sum hevur ábyrgdina av avrikunum hjá Onglandi.

– Sven Gøran Eriksson hevur skyldina av vánaligu avrikunum. Vit venjara vita, at vit hava altíð ábyrgdina av, hvussu okkara lið spæla. Tí er tað altíð Eriksson, sum vit finnast at ella rósa fyri spælið hjá Onglandi. Hansara spælistílur hevur einki vunnið – hvørki kappingar ella virðing, sigur ein bersøgin Morten Olsen.

– Nógvir av spælarunum á enska landsliðnum hava verið við í fimm-seks ár hjá Eriksson, og tí áttu teir at virka sum eitt lið. Men beint undan endaspælinum má tað vera órógvandi fyri liðið, at teir ikki rættiliga vita, hvussu teir skulu spæla. Er tað 4-4-2 ella 5-3-2. Tað er undarligt við so stórur spursmálum beint undan eini HM-kapping.

Morten Olsen heldur tó, at um enska liðið fæst at virka sum eind í hesum endaspælinum, so kann liðið vinna HM.

– Ongland er ein av 10 outsidarum, har Brasil er einasti veruligi favoritturin til at vinna HM. Munurin millum tey bestu liðini er lítil, og fyri Ongland verður tað avgerandi, um teir tora at spæla fótbólt ella ætla at verja við 9 monnum aftanfyri bóltin allatíðina, sigur Morten Olsen.

## Einki hoyrist frá Dómsnevndini

Hóast tað nú eru lidnir 85 dagar, síðani HB og VB/Sumba spældu í kappingini í Løgmanssteypið, so er enn ikki greitt, hvør teirra skal spæla móti EB/Streymi í fjórðingsfinaluni í somu kapping.

Skal metast eftir freistini, sum Dómsnevndin hjá FSF hevur at arbeiða eftir, so skuldi ein úrskurður fyriligið í seinasta lagi seinasta mikudag, men enn hevur ikki borið til at fáa nakað sum helst at vita um nakra avgerð.

Eftir teimum reglum, sum Dómsnevndin hevur at virka eftir, so var seinasta freist at koma við einum úrskurði mikudagin í seinastu viku. Og tað er ikki sørt, at tað man kennast frustrerandi hjá feløgunum, at hægsta nevndin innan FSF á hendan hátt víkir frá sínum egnu tíðarfreistum, tá feløgini sjálvi hava púrasta greiðar tíðarfreistir at svara í teimum málum, sum eitt nú Dómsnevndin hevur við at gera.

Í fjør høvdu vit enntá dømi um, at mál lá í fleiri mánaðir í Dómsnevndini, áðrenn hesi vórðu endaliga avgreidd, men hóast tað neyvan gongur somikið long tíð hesaferð, so er tað ikki í lagi, tá føroyski fótbóltsheimurin skal bíða í tríggjar mánaðir eftir eini avgerð. Eisini hóast talan í fleiri mátar hevur verið um eina óvanliga stóra fløkju.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa viðmerking frá formanninum í Dómsnevndini, Høgna Høgnesen, men komandi vikan fer at vísa, hvørt tað skuldi taka meira enn 90 dagar at avgreiða teir 90 minuttirnar, sum dysturin millum HB og VB/Sumba annars var ætlaður at vara.

**-mørk**